# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fjølmiðlar í fokus

Fjølmiðlar eru í fokus í hesum døgum. Nógv rok hevur verið umKringvarp Føroya, ráðstevna verður umKVF í morgin og fríggjakvøldið sera vit í Miðlahúsinum fokus á miðlar og samfelag. Tað er einki løgið í, at fjølmiðlar afturvendandi eru á dagsskránni. Fjølmiðlarnir ella pressan hava stóran týdning í einum nútímans fólkaræði. Fólkaræðið hevur sum fortreyt, at borgarar og vinnulív eru kunnað, upplýst og megna at fylgja við øllum tí, sum hendir í samfelagnum og í umheiminum. Hetta er heilt einfalt neyðugt fyri, at borgarin t.d. kann útinna tann valrætt, ið hann hevur í fólkaræðiligum samfelagi.

Tað er kanska ikki uttan grund, at pressan verður nevnd hitt fjórða satstvaldið. Ein árvakin pressa hevur eyguni eftir valdsbýtinum í samfelagnum, hon fylgir væl við, hvussu myndugleikar útinna sítt vald og ein árvakin pressa er alla tíðina til reiðar at avdúka og átala ta valdsmisnýtslu, sum tíverri kemur fyri í øllum samfeløgum, eisini í einum demokratii. Vit kundu nevnt fleiri dømi ud, hvussu ein ábyrgdarfull, vakin og saklig pressa hevur steðgað valdsmisnýtslu og so at siga hevur bjargað fólkaræðinum. Um okkara leiðir við talu og skrivifrælsi er tað ikki beinleiðis lívbshættisligt hjá tíðindafóki at leggja seg út við valdsapparatið í samfelagnum, men vit kenna nógv syrglig dømi um at ein atfinnandi og avdúkandi journalistikkur kann kosta lív.

Seinastu árini eru fortreytirnar hjá pressuni grundleggjandi broyttar. Hesar broyttu fortreytir stava frá samfelagsbroytingum og ikki minst frá tí kunningartøkniligu kollvelting, ið vit hava upplivað síðan internetið og digitaliseringin hava vunnið fram um allan heim. Netmiðlarnir og loftmiðlarnir hava kostað einum stórum parti av pappírsavísunum um lívið um allan heimin. Tann pappírsgrundaða pressan, sum enn livir hevur her í Norðurlondum, hevur stórar trupulleikar og ikki er óhugsandi, at vit fara at síggja enn fleiri av teimum gomlu bløðunum fara í søguna.

Eisini her hjá okkum hava vit sæði bløð hvørva, og tað er sera harmiligt. Hinvegin eru eftirverandi bløðini væl fyri og tykjast mennast og at gerast sterkari fyri hvørt ár sum gongur. Men hetta er og verður eitt hart hoyggj at draga og krevur at vit javnt og samt mennast og gerast betri og at vit finna okkara pláss í tí nýggju miðlamyndini. Allir miðlar, skulu, um teir vilja liva, bæði kappast og samstarva sínamillum, samstundis sum teir skulu røkja uppgávuna sum fjórða statsvaldið. Hetta krevur umhugsni og greining og tí tað gott, at fjølmiðlar okkara støðugt eru á dagsskrá hjá almenninginum.

**Sosialurin**

## Rituvíksvegurin

**TÓRBJØRN JACOBSEN**



Fleiri hava helst spurt seg sjálvi og onnur við hesar seinastu dagarnar, hví vit báðir Bill tóku verklagslógina um Rituvíksvegin aftur á tingfundinum hósdagin. Tvær milliónir krónur vóru jú settar av í eini C-átekning á løgtingsfíggjarlógini, ið var samtykt á tingi fyri jól í fjør. Tí skuldi tað verið lagamanni at fingið uppskotið (løgtingsmál no. 156/2008), sum var lagt fram fyri júst einum mánaða síðani, samtykt, soleiðis, at Landsverk kundi bjóða alt arbeiðið út, ið var mett at kosta 14 milliónir krónur.

Ætlaða verklagslógaruppskotið varð steðgað í samgongumaskinarínum fyrr í vár. Vit báðir settu tað fram ístaðin, við neyðugu hjálpini frá ávísum samgongutingmonnum. Eftir tað kom uppskotið um eykajáttanarløgtingslógina fyri apríl mánaða, og tá sá illa út, fíggjarmálaráðharrin hevði skarvað aðra av tveimum milliónum burtur. Brekkan gjørdist uppaftur brattari, táið álitið kom frá rættarnevnd løgtingsins, sum samfeld mælti til at fella uppskotið.

Viðhvørt er tað frægari at taka eitt mál aftur, heldur enn at lata tað falla í tinginum. Tað samdust vit báðir um í hesum førinum. Tingingar í fíggjarnevnd løgtingsins fram eftir hósdegnum vendu tó málinum, og millum fleiri aðrar semjur samdust seks av sjey nevndarlimum um at seta 5 milliónir krónur av til Rituvíksvegin í 2009. Løtu seinri tók ein stórur partur av tinginum undir við hesi semju.

Hetta er framhald av einum vegi, sum hevur staðið í hálvum gekki síðani seinru helvt av áttatiárunum, og sum táverandi samferðsluráðharrin Lasse Klein setti á lunnar. Kreppan steðgaði verkætlanini, og nú røkist umsíðir fyri, at vegurin kann gerast liðugur. Tað ræður bara um, at restupphæddin, á 9 milliónir krónur, verður sett á løgtingsfíggjarlógina fyri 2010. Pírnið, í almennu umfordeilingini mótvegis Eysturoynni (landsins CashCow), tykist hava fingið eina vend, nú tríggjar verkætlanir kunnu byrja í summar, í Skálafirði, í Leirvík og í Rituvík.



**NB:** Málsliga spyr onkur helst, um Rituvíksvegurin ikki heldur er Rituvíkarvegurin, og til ber at svara sum Dan R. Petersen á sinni: "Hví liggur Rituvíkarvegurin um Rituvíksháls, og hví var KvívíkarTummas KvívíksTummas, áðrenn hann flutti til Havnar at búgva?" - Kanska ein spurningur til fuglfirðingin í málteignum hjá morgunredaktørunum í Útvarpinum onkran av døgunum?

## Tá ið omma og eg løgdu klæðir á blik

**ODDVØR JOHANSEN**

*" Í bønum á blik løgdu gentur løk,*
*og roykurin rak yvir grasgrøn tøk."*
*H.A. Djurhus*

Oftast vóru tað posaløk. Eitt posalak varð seymað burtur úr brúktum mjølposum, sum vóru heldur grálígir úr grovum stóti. Teir blivu vaskaðir og sprettir upp, so at seymað kundi verða burtur úr teimum.

Omma seldi nógv mjøl í handlinum hjá P.A. Restorff og alt, sum kundi, bleiv endurnýtt, eisini 200 pundsposarnir. Nógv fólk fingu posar.

Løkini vórðu seymað saman við fløtum seymi fyri at vera so slætt sum gjørligt. Síðan vórðu tey kókað í soda og grønsápu, og nú fóru vit báðar út á vøllin at leggja á blik. Eg slapp at finna passaligar steinar at leggja í hvørt hornið, so at vindurin ikki skuldi taka løkini. Har kundu tey so liggja í fleiri dagar. Tey blivu nakað dálkað av fugli og veðri, men nú bleiktust tey so líðandi, blivu vend o.s.fr. Til endans vórðu tey vaskað umaftur á vaskibrettinum , skolað í bláilsi og hongd út á snórarnar at torna.

Hesi løkini vóru sera sterk, og eg minnist enn kensluna av tí grovu vondini, men heilt kritahvít haldi eg ikki, at tey blivu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.